# Hugleiðingar við børuna hjá einum floksfelaga



“Lívsins nátt svinnur brátt” syngja vit í kirkjuni á Bispebjerg Hospitali hesa seinnapartsløtu í Keypmannahavn, har 75-80 fólk eru samankomin til bønarhald. Orðini tykjast lítið samsvarandi við hesa annars ljósu løtu, tí í dag stendur sólin hægst á himli, og tað er summar í luftini. Og tó kennist hetta onkursvegna sum “lívsins nátt”, tí undir kistulokinum liggur Ingi Mohr. Hin altíð livandi og ljóslynti havnardrongurin er farin hiðani – og nú siga vit farvæl.

60 ár eru liðin síðan fyrsta skúladag hjá okkum báðum. Tað finst vist eingin felagsmynd av hesum blandaða barnaskara, sum við skúlatasku í hond fór til fyrsta tíman í gamla kommunuskúla í 1949. Men myndin livir í huga mínum. Myndin av einum vónríkum barnaflokki, sum steig fyrstu fótafetini inn í skúlaheimin, spentur um, hvat skúlin og lívið sjálvt høvdu at bjóða. Og teirra millum var Ingi.

Í gamla kommunuskúlagarðinum møttist øll Havnin, og har vórðu vinabond knýtt. Skúladagurin byrjaði við morgunsangi, og eg síggi fyri mær lærararnar standandi í skúlagongini: Zacharias Sørensen, Johan Olsen, Jákup av Skarði, Holger Bærentsen, Jacob Wenningstedt, Poul Petersen, Hans Husgaard, John Davidsen, Hjørdis Henriksen – og onnur lærarafólk, sum saman við næmingunum stemmaðu í:

*Morgunroðin lýsir*
*bjart á fjøll og skýggj,*
*brátt úr havi rísur*
*sólin blonk og lýggj.*
*Yvir líð og eingir*
*náttardøgg er løgd.*
*Reisist gentur, dreingir*
*upp til dagsins brøgd.*

So varð farið til verka, og bøkurnar komu fram. Danskt og føroyskt, rokning og landalæra, søga og kristni. Tolnir og minni tolnir lærarar, sum terpaðu tøl og stavsetingar við okkum. Orð lærarans vóru lóg og rættur í teimum døgum. Men tá var tað gott at hava Inga við í hópinum, tí hann setti mangan lit á tilveruna við sínum livandi verumáta.

Hetta var jú ein heilt onnur tíð. Eitt nú var tað vælsignað vælgerandi, at Sørensen yvirlærari mitt í skúlatímanum kom inn og segði, at tað vóru grindaboð, og so fekk allur skúlin frí.

Fleiri av okkum dreingjum spældu eisini saman aftan á skúlatíð. Havnin var okkara ævintýrverð. Niðri í Vágsbotni, á Kongabrúnni, á Skálatrøðni og úti í Rættará. Her spældu vit havnardreingir okkara spøl, fiskaðu niðri á keiini, sóu “mjólkarbátarnar” og aðrar bátar koma og fara. Vit livdu við øllum, sum fyrifórst har. Heimið hjá Inga var mitt í hjartanum av Havnini – úti á Reyni – og har var eg eisini onkuntíð eftir lokna skúlatíð.

Saman fóru vit einaferð til skúlatannlæknan, sum hevði fingið høli í kommunuskúlanum. Vit hildu nokk, at hetta var bert eitt vanligt eftirlit. Men gakk – Ingi hevði eina tonn, sum mátti takast. Og tað var ikki uttan dramatikk. Tonnin varð tikin, meðan eg sat har púra hjartkiptur, tí aftaná var tað mín túrur at fara í heita stólin.

Okkara leiðir skiltust, tá vit vóru um 11 ára aldur. Eg fór í Realskúlan og Ingi seinni í Preliminerskúlan. Men altíð tosaðu vit saman, tá høvi var til tess. Hann møtti Onnu, sum hevur staðið við lið hansara, líka til Ingi slóknaði hendan sunnudagin á Bispebjerg Hospitali. Tey fingu trý børn og níggju barnabørn. Og væl hava tey staðið saman.

Í dag er skarin spjaddur, sum fór í fyrsta flokk fyri 60 árum síðani. Tey flestu búgva ivaleyst í Føroyum, men nøkur búsettust uttanlands. Fleiri floksfelagar eru farnir undir grønu torvu, men teir liva í hugaheimi okkara. Vit verða støðugt mint á orð Prædikarans, at alt hevur tíð sína.

Og nú fór so Ingi. Lívið kom bæði at hava storm og stilli við sær. Men gott var at síggja, tá ið ein álvarsom sjúka fór at gera vart við seg, at Ingi hevði eitt sálarakker, sum bar hann gjøgnum royndirnar – trúnna á Harran Jesus.

Og her í kirkjuni á Bispebjerg Hospitali enda vit løtuna við at syngja um flytifuglarnar, áðrenn kistan verður borin út. Ingi elskaði sang, og hetta var ein av yndissangum hansara. Sangurin um fuglarnar, ið gera seg til reiðar at flyta til heitari lond, tí “eitt ljósari land honum bíðar, har summar og sól altíð er.” Gott at vita, at eisini Ingi var ferðabúgvin.

**Øssur Berghamar**

## Takkarkvøða

Nú hugnaligi og væleydnaði silvurbrúdleypsdagur okkara er farin væl og virðiliga aftur um bak vilja vit á henda hátt siga øllum takk sum á einhvønn hátt hjálptu og heiðraðu okkum og settu sín serstaka dám á dagin.

**Andrea og Jan Kristoffersen**

**Dagurin**
**24. juli. Kristin.** Eftir halgisøguni er talan um eina 11 ára gamla gentu, sum verður tikin av døgum, av tí at hon breyt nakrar skurðgudamyndir og gav teimum fátæku gullið og tað dýra tilfarið, tær vóru gjørdar úr. Annars hava tvær halgar kvinnur 24. juli sum minningardag, sankta Kristina úr Týrus og sankta Kristina úr Bolsena.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta -útgáva 2008)*

## Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá okkara kæri

**Óli Christian Danielsen**
Saltangará

andaðist og varð jarðaður
Tøkk fyri góð orð í Kapellinum, í Berøa og á grøvini.
Tøkk til Sangbólkin í Nebo.
Takk fyri bussar og Ítróttarhøllina og takk til tykkum, ið hjálptu til.
Tøkk fyri kransar, blómur og fyri gávur til Zarepta.
Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað her á fold.

Eisini ein hjartans tøkk til tykkum, ið mintust okkum diamantbrúdleypsdagin.
Hjartans takk øll somul.

**Jona,**
**Jenny, Anna, Poulaj, Katrin, Arndis, Tórálvur, Karolina og Símun við familjum**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Lítli Klæmint Kjartanson Hansen úr Klaksvík**, sonur til Mariu og Kjartan Hansen, andaðist á Ríkissjúkrahúsinum týsdagin 21 juli, 5 ára gamal. Jarðarferðin verður leygardagin kl. 13.30, úr Betesda. Tey ið vilja minnast Klæmint, kunnu lata eina gávu til Akurin (trúðboðarabørn) konto í peningastovnunum.

21. juli andaðist í heiminum **Daniella Toftum**, vanliga nevnd Daniella í Kálhaganum, Vágur, 79 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum á Tvøroyrar sjúkrahúsi fríggjadagin kl. 17, og jarðarferðin verður úr Vágskirkju leygardagin kl. 14. Sungið verður úr sálmabókini.

**Jógvan Martin Poulsen**, ættaður úr Ljósáum, búsitandi í Danmark, andaðist týsdagin 65 ára gamal. Jarðarferðin verður frá Hirshalskirkju 28. juli kl. 13. Tey ið vilja minnast Jógvan Martin kunnu lata eina peningagávu, konta í Eikbanka.